gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Føroysk list í Keypmannahavn

**Tróndur Patursson og J. P. Gregoriussen sýna fram í Keypmannahavn**

LIST
*Turið Kjølbro*

Í hesum døgum ber til at síggja fjølbroytta føroyska list á tveimum støðum í Keypmannahavn. Fram til 10. juni sýnir Tróndur Patursson fram glaslist, vatnlitsmálningar og grafikk í Kastrupgårdsamlingen, Kastrupvej 399. Útgangstøðið hjá Tróndi er stórfingna náttúran, sum er rundan um hann í heimbygdini Kirkjubø.

Um somu tíð er framsýningin "Kirkjurnar í Føroyum" komin til Keypmannahavnar. Hetta er komið í lag í samstarvi við nevndina fyri Túsundára haldið fyri kristnanini av Føroyum. Framsýningin hevur verið runt um í Føroyum, í Norðurlandahúsinum í Reykjavík og er í hesum døgum at síggja í Nordisk Ministerråd, Store Strandstræde 18 í Keypmannahavn. Tað ber til at síggja framsýningina yrkadagar frá kl. 9.00-16.00 fram til 4. mai. Tað eru tekningarnar í teim fýra bókunum um kirkjurnar í Føroyum eftir J. P. Gregoriussen, arkitekt og listamann, sum verða sýndar fram.



*J. P. Gregoriussen*



*Tróndur Patursson*

# Krevjandi og læruríkt



*Myndatekstur: – Eg mæli øllum ungum til at fara á háskúla í Kungälv. Tað er eitt upplivilsi fyri lívið, sigur 23 ára gamla Birita Andreasen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**– Eg hevði ikki roknað við, at so nógv verður gjørt burtur úr skúlagongdini, tí nógvir háskúlar bera orð fyri at fara lætt um skúlagongdina. Men í Kungälv krevja lærararnir nógv av okkum, og av tí sama hava vit lært nógv, sigur Birita Andreasen, sum gongur á norðurlendska háskúlanum í Kungälv**

ÚTBÚGVING
*Turið Kjølbro*

Í fýra vikur hevur 23 ára gamla Birita Andreasen úr Vestmanna verið í starvsvenjing á Sosialinum. Birita gongur á háskúla í Kungälv á journalistgreinini. Hon varð liðug á hægri handilsskúla í fjør.

– Eg havi leingi ætlað at farið á háskúla, mær hevur altíð dámað væl at skriva og tá ið eg blaðaði í Højskolens Fælleskatalog, kom eg fram á háskúlan í Kungälv, greiðir Birita frá.

Háskúlin í Kungälv er norðurlendskur skúli. Hann liggur stutt frá næst størsta býnum í Svøríki, Gøteborg, einar 20 minuttir at koyra við bussi. Á skúlanum ganga 300 næmingar, har 70 teirra eru ung úr øllum Norðurlondum, ið búgva á skúlanum. Hinir 230 næmingarnir eru sviar, sum ganga á háskúlanum sum fyrireiking til miðnámsskúlan. Skúlaárið er 10 mánaðir, frá august til seinast í mai.

– Mær dámar ógvuliga væl. Skúlin liggur á einum heyggi í einum bý, umhvørvið er sera vakurt við nógvum trøum, sigur Birita.

## Krevjandi og læruríkt

Lærararnir eru úr Noregi, Svøríki og Danmark, og gestalærarar úr øðrum londum undirvísa eisini á skúlanum. Skúlaskipanin er bygd upp av ymiskum greinum, journalistgreinini, Skagerak-greinini, tónleikagreinini, sjónleikagreinini, og demokratgreinini. Tey trý úr Føroyum, sum ganga á skúla í Kungälv hetta skúlaárið, ganga á hvør sínari grein.

Skúlagongdin er ógvuliga væl fyrireikað.

– Eg hevði ikki roknað við, at so nógv verður gjørt burtur úr, tí nógvir háskúlar, í øllum førum í Danmark, bera orð fyri at fara lætt um skúlagongdina. Men í Kungälv krevja lærararnir veruliga nógv av okkum, tað gongdur skjótt fyri seg og av tí sama hava vit lært nógv. Vanliga fáa vit eina uppgávu um morgunin, sum skal verða liðug á middegi og so tosa við um allar uppgávurnar seinnapartin, sigur Birita, sum gongur í flokki saman við einum finnlendingi og 11 svium.

Skúlagongdin er skipað við evnisarbeiði. Eitt nú hevur útvarpsarbeiði verið á skránni í tvær vikur, síðani reportasjur, tíðindi og annað, og evnini ganga uppá skift. Næmingarnir skulu í starvsvenjing eina ferð og tá skulu teir velja seg inn á eina ávísa grein. Birita valdi at fara í starvsvenjing á Sosialinum, lutvíst tí hon vildi sleppa at skriva og lutvíst tí hon vildi sleppa heim til Føroya eina tíð.

– Okkara flokkur hevur mest sum bara svenskar lærarar, á skúlanum skrivi eg alt á donskum, men eg vildi sleppa at royna meg á føroyskum. Mær dámar alt journalistarbeiði, tað er stuttligt at gera útvarp, men best dámar mær tó at skriva, sigur Birita.

Hon letur væl at tíðini í blaðhúsinum á Argjum. Hon hevur mest sum fingið fríar teymar at gera sum hon vil, men hevur kortini verið partur av føstu blaðfólkamanningini við bindandi evsta marki hvønn dag.

– Nú havi eg í øllum førum funnið út av, hvussu lívið er á einum blaði. Framman undan visti eg, at blaðfólk arbeiða undir trýsti og at alt skal ganga skjótt fyri seg, so tað er ikki komið óvart á meg. Í roynd og veru haldi eg tað er stuttligt, at alt skal ganga so skjótt fyri seg. Best dámar mær at fara út og tosa við fólk heldur enn at ringja út til fólk.

## Framtíðin

Birita hevur ikki gjørt upp við seg sjálva, um tað er journalist hon skal læra til. Háskúlin í Kungälv er sum nakað nýtt farin undir ein yvirbygnað til journalistgreinina, sum eisini varir eitt ár. Til hesa greinina sleppa bara átta næmingar. Um Birita søkir upptøku til yvirbygnaðin velst um ymisk viðurskifti, eitt nú kostnað, tí tað er ikki heilt bíligt at ganga á háskúla í Kungälv. Skúlagongdin kostar 40.000 krónur fyri hvønn næming. Seks ungfólk úr Føroyum og Íslandi fáa á hvørjum ári hálvt fríplass á skúlanum hvør, og umframt ber til at søkja um stuðul úr ymsum grunnum, soleiðis at kostnaðurin verður minni. Næmingarnir fáa ikki lestrarstuðul, so eisini lummapengar skulu tey ungu útvega sær sjálvi.

– Eg vil kortini mæla øllum til at fara á háskúla í Kungälv. Tað er eitt upplivilsi fyri lívið, í frítíðini er nógv at gera og fara til, í vikuskiftinum fara vit ofta til Gøteborg ella okkurt verður fyriskipað á staðnum. Og vinir fær ein eisini, greiðir Birita frá.

Í gjár byrjaði Birita aftur á skúlanum í Kungälv. Áðrenn skúlatíðin er av um ein góðan mánað, skal hon á reportasju-ferð til Álands.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur
Nr. 77 • týsdagur • 24. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Eingin víðkan av deildini

**Mest umrødda málið undan aðalfundinum hjá Hondbóltssambandinum mundi vera uppskotið um eina víðkan av bestu kvinnudeildini, men aðalfundurin feldi hetta uppskotið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hondbóltssamband Føroya hevði árliga aðalfundin leygardagin, og longu undan fundinum tóktist greitt, at hesin fór at verða av tí meira drúgva slagnum. Fleiri áhugaverd uppskot vóru á skránni, og tað vísti seg eisini, at fundarfólkið mátti nýta at kalla allan leygardagin til fundin, sum vardi frá kl. 10 um morgunin til knapt fimm seinnapartin.

## Víðkanin fall

Eitt av teimum evnum, sum hava fingið mest umrøðu seinastu tíðina, er málið, hvørt tað skulu verða Tjaldur ella Sóljan, sum skulu flyta niður úr bestu kvinnudeildini. Enn er hetta mál avgreitt, men á aðalfundinum varð lagt fram uppskot, sum kundi tryggjað, at bæði liðini kundu verða verðandi í deildini.

Uppskotið snúði seg um at víðkað talið av liðum í bestu kvinnudeildini til átta lið, og varð hetta samtykt, hevði tað gjørt tað sama, hvat úrslitið av ígongdverandi málinum hevði verið.

Roknað var framman undan aðalfundinum við, at nøkur feløg fóru at taka undir við uppskotinum, men hóast hetta so var undirtøkan ikki nóg stór, til tess at samtykkja uppskotið. Fýra atkvøður vóru fyri uppskotinum, meðan seks vóru ímóti, og so var ikki so nógv annað at gera við hetta.

## Tríggjar útlendingar

Eitt annað evni, sum eisini hevur fingið drúgva umrøðu í farna kappingarári er talið av útlendingum, sum hvørt liðið kann hava í dysti. HSF hevur ikki havt egnar reglur á hesum økinum, og í ár hevur so ivamál tikið seg upp, hvørt tað var loyvt Stjørnuni og VÍF at hava tríggjar útlendskar leikarar í hópinum.

Hetta varð fyri fyrst góðkent av HSF, men nú hevur sambandið so viðtikið serstakar reglur á økinum, og í hesum verður staðfest, at hvørt lið hevur loyvi at nýta tríggjar útlendskar leikarar. HSF hevur ikki gjørt reglur fyri, hvussu ein útlendingur verður defineraður, so tað verða reglurnar hjá ÍSF, sum gera av, hvørjir leikarar verða roknaðir fyri útlendingar.

## Nýggjan fund

Annars vóru fleiri onnur áhugaverd uppskot, men felags fyri flestu av hesum var, at tey vórðu útsett til eykaaðalfundin, sum HSF fer at hava í juni ella juli mánaði.

Millum hesi mál er millum annað eitt uppskot til reglur fyri sáttmálaleikarar, sum kappingarnevndin skal gera til ta tíð, eins og tað eisini skal takast støða til, í hvønn mun yngru leikararnir í fremstu deildunum skulu kunna flyta millum deildir.

## Valini

Annars skuldu fleiri nevndarlimir veljast á fundinum, og í summum førum viðførdi hetta broytingar í nevndunum undir HSF.

Starvsnevndin trelir nú Petur Ova Petersen, Turid Samróð, Kára Durhuus og Rógva Nielsen. Rógvi hevur undan hesum verið tiltakslimur í nevndini, men eftir at Kári Mortensen segði nevndarsessin frá sær, er Rógvi nú valdur í nevndina. Nýggjur tiltakslimur er Simona Nielsen.

Kappingarnevndin er óbroytt eftir aðalfundin. Jógva Martin Mørk og Julian Olsen vórðu her afturvaldir, meðan Pól Magnussen ikki stóð fyri vali.

Í dómsnevndini ynskti Turid Samróð ikki at stilla uppaftur, og nýggja dómsnevndin er sett saman av Niels Nattestad, Jógvan Elias Winther Poulsen og Øssur av Steinum.

At enda skuldi eisini nýggjur limur veljast í dómaranevndina, har Hanus Kúrberg hevur tikið seg úr. Nýggju limur her er Hans Holm, og afturat sær hevur hann teir báðar, Hjalmar Petersen og Kristian Johansen.



*Besta kvinnudeildin fer eisini at telja sjey lið komandi kappingarár, so antin Tjaldur ella Sóljan noyðast niður í aðru deild*

# Havnin ímóti bygdarmonnum á ólavsøku

**Havnarfeløgini skulu dystast í aðrari hálvfinaluni, meðan hin uppgerðin verður ímillum feløgini í næststørstu og triðju størstu kommununum**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

Nú er tað komið so mikið langt, at tað er greitt, at ein nýggjur steypavinnari skal finnast. Í fjør megnaði GÍ at vinna sítt fyrsta lutabræv í nýggja løgmanssteypinum. GÍ tapti sunnudagin fjórðingsfinaluna ímóti NSÍ. Tað vil við øðrum orðum siga, at gøtumenn hava ongan møguleika at koma víðari í kappingini.

NSÍ er tað einasta av teimum fýra feløgunum í hálvfinaluni, sum ongantíð hevur vunnið løgmanssteypið. Í 1998 vann HB fyrsta løgmanssteypið til ognar. KÍ, sum sunnudagin við sigri á ÍF kom í hálvfinaluna, vann í 1999 fyrstu kappingina um nýggja løgmanssteypið. B36 vann eina ferð kappingina um fyrsta løgmanssteypið. Tað var í 1991. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað eru ellivu ár síðani, at B36 endaði ovast í steypakappingini.

NSÍ hevur eina ferð vunnið steypakappingina. Tað var í 1986. Hetta árið var tað sætta, at tað varð kappast um triðju ísafjarðarsúluna, sum HB vann til ognar í 1988.

B36, HB og KÍ hava øll luttikið í Europa Cup sum meistarar og steypavinnarar. NSÍ er einasta felagið í hálvfinaluni, sum ongantíð hevur roynt seg í Europa Cup.

## Ólavsøkan ímóti bygdarmonnum

Longu fríggjamorgunin varð lutur kastaður um, hvussu liðini skulu hittast í hálvfinaluni. Tað er greitt, at NSÍ og KÍ skulu spæla í aðrari hálvfinaluni, og at B36 og HB skulu spæla í hinari hálvfinaluni. Fyrra umfarið í hálvfinaluni verður sunnudagin 13. mai. Seinna umfarið verður Kristi himmalferðardag, sum verður hósdagin 24. mai.

B36 og HB hava longu spælt tvær ferðir ímóti hvørjum øðrum í bólkaumfarinum í steypakappingini. Báðu ferðirnar var úrslitið 1–1. Um tað stendur á jøvnum eftir bæði umførini í hálvfinaluni, so fer tað liðið, ið hevur skorað flest mál á útivølli, víðari í finaluna. B36 og HB eiga bæði heimavøll í Gundadali, og tey fara sjálvsagt at kenna seg á heimavølli í báðum dystunum. Men tað verður B36, sum fer at eiga heimavøllin í fyrru hálvfinaluni, og HB fer at eiga heimavøll í seinnu hálvfinaluni.

Kí eigur heimavøll í fyrra umfarinum, og NSÍ í seinna umfarinum. Spurningurin er so, hvørji lið fara at hittast í finaluni. Møguleikarnir eru hesir: B36–NSÍ. B36–KÍ, HB–NSÍ og HB–KÍ. Tað einasta, sum er víst, er, at finalan verður ein uppgerð ímillum annað av stóru feløgunum í høvuðsstaðnum og felagið í næststørstu ella í triðju størstu kommununi í landinum. Finalan er ásett at vera á Tórsvølli ólavsøkudag.